FISKIVINNUTÍÐINDI

## Taka undir við fiskimálaráðharranum

Í gjár var aðalorðaskifti á tingi um framtíðar fiskivinnupolitikkin í Føroyum. Orðaskiftið var grundað á eitt upplegg, sum fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen legði fyri tingið í seinastu viku. Sum heild tóku tingmenn væl undir við ætlanunum hjá fiskimálaráðharranum. Hetta kemst av, at fiskimálaráðharrin hevur verið varin, tá hann hevur orðað fiskivinnupolitikkin. Hesin byggir fyri ein stóran part á verandi fiskivinnupolitikk.

Tað sum fekk mestu umrøðuna var umsetiligheitin í fiskivinnuni. Fiskimálaráðharrin mælir til so stórua umsetiligheit sum gjørligt innan teir ymisku skipabólkarnar heilt niður til úrtróðrarbátarnar undir 15 tons. Men tingmenn halda ikki, at tað er rætt at fara so langt niður. Heini O Heinesen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin helt, at markið átti at liggja á 40 tonsum heldur. Hann sá vandan í fisikdagarnir hjá útróðrarbátum yvir 15 tons kundu gerast so attraktivir, at teir vórðu keyptir upp af størri skipum og tí kundi hesin skipabólkur fara í søguna.

## Mælir frá fiskidøgum

Hendrik Old, tingmaður hjá Javnaðarflokkinum mælti frá, at teir stóru djúpvatnstrolararnir fara undir eins fiskidagaskipan burturav . Hann kundi gang við til at djúpvatnstrolararnir fingu eina fiskidagaskipan fram um hjáveiðukvotuskipan á teimum innaru leiðunum, men hann mælti staðiliga frá at trolararnir komu undir eina fiskidagaskipan, sum eisini fevndi um tær ytru leiðirnar.

– Tá skip royna langt úr landi, so kann ein fiskidagaskipan virka sum eitt haft um beinið. Eitt nú , tá trolararnir liggja á rygginum um veturin, tá kann viðra illa, og teir hava ikki samam møguleika at fara til hús sum menn, ið royna tætt við land. Taksametri telir alla tíðina og tí kunnu vit rokna við, at teir fara at nýta verri veður enn ráðiligt er fyri at útnytta fiskidagarnar og hetta gongur útyvir trygdina. Sama er, tá trolarar royna suður móti markinum og suðurum í altjóða sjógv, tá skuldi ikki verið neyðugt við nakrari regulering. segði Hendrik Old.

# Vesturvón á Flemmish Cap

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í gjár fór flakatrolarin "Vesturvón" nýggjan túr. Hesuferð gongur leiðin vestur í hav vestur á Flemmish Cap, har teir fara at royna eftir svartkalva.

– Loyvir verður at fiska svartkalva frá fyrsta mai og vit ætla okkum at vera á leiðini, tá økið verður upplatið. Hetta er næsta árið, at vit gera svartkalvatúrar á Flemmish Cap og tíðin er góð nú, sigur Ólavur Petersen, reiðari á Vesturvón.

Teir rokna við at royna á Flemmish Cap teir næstu tveir mánarnar. Tá hevur toskurin í Barentshavinum flutt seg so langt eystur, at roynast kann eftir honum í russiska partinum av Barentahavinum og har eiga føroyingar kvotu.

– "Vesturvón" hevur júst verið í Bretlandi og landað.



*Vesturvón fer av Sørvági*

Veiðan vá 530 tons í flaki. Prísurin er góður á toski. Teir vóru tríggjar mánaðir burtur seinasta túrin. Vit eiga ein líknandi túr eftir í norskum sjógvi. Tann túrin fara teir seinni í heyst, sigur Ólavur Petersen, reiðari.

# Gera ICES tilmæli í Føroyum

Toskurin, hýsan og upsin verða vigað av einum arbeiðsbólki hjá ICES á Fiskirannróknarstovuni í hesum døgum.

Tað er Útnorður bólkurin (North Western Working Group), sum er savnaður at mera um nøgdirnar og útlitini fyri m. a. tosk, hýsu og upsa undir Føroyum. Eisini skal bólkurin taka støðu til toskin, hýsuna og upsan undir Íslandi og toskin undir Eysturgrønlandi. Eisini skulu metingar gerast av felagsstovninum av kongafiski og svartkalva.



*Hjalti í Jákupstovu hevur saman við starvsfeløgum í ICES úr at gera í hesum døgum, gera grundarlagið fyri tilmælinum hjá ICES í komandi ári*

Fundurin byrjaði í gjar og endar 4. mai. 20 fólk eru í arbeiðsbólkinum. Tey eru úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi, Ruysslandi og Spaniu. Tey skulu skriva eina frágreiðing til ráðgevandi nevndina hjá ICES og hendan frágreiðing verður grundarlag til endaliga tilmæli um fiskiskapin komandi ár.

Frágreiðingin í fjør var meira enn 300 síður og byggir á tilfar sum Fiskirannsóknarstovurnar hava savnað farna og undanfarin ár frá fiskiskipum og fiskirannsóknarskipum.

J.J. Maguire úr Kanada hevur síðan 1996 verið við í arbeiðsbólkinum fyri Føroyar.

# Fleiri flakavirkir stongja í summar

Summarfrítíðin nærkast og hetta kemur eisini at merkjast í fiskivinnuni. Í ár fara 12 fiskavirkir at stongja í summarfrítíðini. Tey fara at lata aftur frá einari viku upp í fimm vikur. Virkini talan er um eru virkini hjá Fiskavirking í Miðvági, Havn, Toftu, Vestmanna og Tvøroyri. Eisin far Sandoy Seafood, Pure Water, Norðís- Seafood og Kjartan Joensen, skrivar Vinnuhúsið.

| Virki/Vika | 27 | 28 | 29 | 30 | 31 | 32 | 33 | 34 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FFV Miðvági | Stongt | Stongt | Stongt | | | | | |
| FFV Vestmanna | | | | Stongt | | | | |
| FFV Havn | | | Stongt | Stongt | Stongt | | | |
| Sandoy Seafood | | | | Stongt | Stongt | | | |
| Fiskavirkið í Gøtu | | | | Stongt | Stongt | | | |
| Kósin Seafood | | | | Stongt | Stongt | Stongt | | |
| Pure-Water | | | | Stongt | Stongt | Stongt | | |
| Norðís Seafood | | | | Stongt | Stongt | Stongt | | |
| Kjartan Joensen | | | | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt |
| FFV Toftir | | | | | Stongt | Stongt | Stongt | |
| Vaðhorn Seafood | | | | | Stongt | Stongt | Stongt | |
| FFV Tvøroyri | | | | | Stongt | Stongt | | |
| Landingarm.í Sørvági | | | | Stongt | | | | |

*Summarferia á fiskavirkjum 2001-04-25 Talvan sýnir hvørji fiskavirkir fara at halda frí í summar og nær*







































